STEÐGISTAÐUR

Auschwitz

Undir seinna heimsbardaga gjørdu nasistarnir av, at teir skuldu loysa "jødaspurningin". Avgjørt varð, at allir jødar skuldu verða týndir. Eisini Jehova vitni, sigoynarar, menningartarnað, samkynd og politisk mótstøðufólk skuldu verða dripin í týningarlegum.

Morð sum ídnaður

Ídnaðargjørda hópdrápið at týna fram um alt jødar, men eisini Jehova vitni, sigoynarar, samkynd, menningartarnað o.o. verður lýst sum ringasta brotsverkið í søguni hjá mannaættini. Hetta óhoyrda, næstan ófatiliga lægsta stigið í langa lívi menniskjunnar her á jørð verður rópt *týningin*, ella *shoha* á hebraiskum.

Týningin var í týningarlegum. Tað vóru legur, ið fram um alt vóru *arbeiðslegur*, og aðrar, sum vóru reinar *týningarlegur*. Summar legur vóru bæði.

Jødarnir skuldu verða týndir, sambært nasistunum. Teir vóru hildnir at verða lívfrøðiliga minni mentir og brotsligir. Í víðsjónini hjá nasistunum við teirra framtíðarsamfelag var ikki rúm fyri menniskjum, sum ikki hóskaðu inn í teirra form ella mynstur. Menniskjum, sum vóru óynskt, góvu teir heitið "undirmenniskju". Teir hildu, at tey kundu skaða "arisku rasuna". Tí var ein fyrisitingarlig avgerð tikin um at gera stórar legur, har fólk skuldu verða dripin eftir ídnaðarligum málistokki.

Nasistarnir drópu menniskju á nógvar ymiskar hættir. Fleiri vórðu noydd til at arbeiða seg til deyða, onnur vórðu skotin, men tann allar ræðuligasti hópdrápshátturin var at gassa fólk til deyða. Fangarnir vórðu beindir inn í stór skiftingarrúm, har teir skuldu lata seg úr øllum og so halda fram inn í "brúsurúmið". Har vóru brúsumunnstykki undir loftinum, men tað kom ikki vatn úr teimum. Í staðin vórðu hurðarnar læstar, og so varð gass latið gjøgnum brúsurnar, Zyklon B (vætucyanid), sum spakuliga kvaldi innilæstu menniskjuni. Hurðarnar vórðu latnar upp aftur, og aðrir fangar í leguni tóku líkini. Ringar og prýði vórðu tikin av, og gulltenn og gullfyllingar vórðu trektar út. Hárið á kvinnunum varð brúkt til at gera klæði burturúr. Klæði og annað, sum lá eftir í skiftingarrúminum, varð rænt fyri alt, sum hevði nakað virði. Stórir salar vórðu fyltir við kuffertum, taskum, brillum, handilstonnum og gjørdum limum, sum nasistarnir stjólu frá teimum deyðu.

Oświęcim


Av øllum týningarlegum, sum nasistarnir bygdu, var ein størri enn aðrar – *Auschwitz*, har suðuri í Póllandi. Navnið er pólska navnið á pólska býnum, har legan varð bygd, týtt til týskt – Oświęcim.

Auschwitz er trý støð (tað er enn til og er ein partur av heimsarvinum):

- Auschwitz I var ein lega fyri politiskar fangar, umframt ein staður fyri píningarlíkar læknafrøðiligar royndir.
- Auschwitz II, eisini nevnt Birkenenau, var ein ovurstór týningarlega.
- Auschwitz III var ein arbeiðslega, sum veitti eini gummiverksmiðju arbeiðsmegi.

Viðurskiftini í legunum vóru ræðulig. Deyðin var allastaðni, í óndum leguvaktum, sjúku, føðslutroti og rúkandi líkbrenningarovnum. Tey, sum ikki vórðu leidd beinleiðis inn í "brúsurúmið" og deyðan, fingu eitt stutt lív í hesum helviti av eini legu. Tvíburar, sum komu til Auschwitz, kundu enda hjá læknanum Josef Mengele. Hann gjørdi royndir við fangunum. Til dømis seymaði hann tvíburar saman, so at teir fingu sama blóðrensl.

1. Hvussu heldur tú, tað ber til at bera seg soleiðis at móti øðrum menniskjum?
2. Heldur tú, at týningin hevði kunnað hent aftur í nøkrum líki? Grundgev fyri svari tínum.
3. Greið frá, hví týningin verður nevnd ringasta brotsgerðin í søguni hjá mannaættini?
4. Kanna eftir, hvussu nógv menniskju vórðu dripin í legunum, og ber saman við fólkatalið í t.d. Danmark.
5. Kanna eftir, hvat hendi við Josef Mengele eftir kríggið.
6. Yvir inngongdina til Auschwitz stendur "Arbeit macht frei". Kanna eftir, hvat tað merkir. Hvat heldur tú, at týskarar meintu við?



Fangar verða merktir. Liturin og formurin á merkinum vístu, hvat slag av fanga ein var. Ovasta røðin vísir grundlitirnar fyri ymsar bólkar, millum annað politiskar fangar, yrkisbrotsmenn, Jehova vitni, samkynd og sigoynarar. Hesir grundlitir vórðu settir saman við uppískoytismerkjum. Tey vístu t.d., um ein var jødi ella revsaður fyri at hava roynt at flýggja ella brotið reglurnar fyri leguna. Myndin niðanfyri vísir fangar í Buchenwaldleguni í 1945.

